## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin, leygardagin og sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av suðri og landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 15 og 20 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av suðri og útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 12 og 16 stig.

Mai var bæði kaldur og turrur. Miðalhitin bleiv 6,3˚ móti 7,0˚
Avfallið var bert 35,6 mm móti 71,5

## DAGSINS FØROYINGUR

# »Eg hati fótbólt«

**22 ára gamla Henrietta Hammer úr Kollafirði er ikki áhugað í fótbólti, men vónar kortini at Portugal gerst heimsmeistari í ár**

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*22 ára gamla Henrietta Hammer úr Kollafirði dámar væl kappróður, men ikki fótbólt*
*Mynd: Jens Kristan Vang*

**■ Hvat ger tú dagliga?**
– Eg havi arbeitt á Marknaðardeildini á Sosialinum síðani 1. apríl í ár. Her arbeiða vit við at útvega lýsingar til blaðið og at gera tær klárar til prentingar.

**■ Hvat gjørdu tú áðrenn tú byrjaði á Sosialinum?**
– Eftir at eg var liðug við Hægri Handilsskúla í fjør summar, arbeiddi eg á skrivstovuni hjá Kloosterboer í Kollafirði. Eg ætli mær at læra til journalist, og tá so eitt arbeiði var til mín í Miðlahúsinum í Vágsbotni, so var tað júst eftir mínum ynski. Hetta er eitt spennandi arbeiði á einum góðum arbeiðsplássi

**■ Hvat gleðir tú teg mest til á Sundalagsstevnuni um vikuskiftið?**
– Eg havi sjálv róð, bæði við Kolli og Falkinum, og tí hevur kappróðurin mín stóra áhuga. Eg elski kappróður. Annars fari eg til stevnuteitið, tí har er altíð onkur kúllur sum hevur gjørt okkurt býtt. Djóragarðin á Royndarstøðini ætli eg mær at vitja saman við gudbørnunum, og leygarkvøldið fari eg í dans í ítróttarhøllini saman við vinfólki at lurta eftir Showmonnum

**■ Hvør fer at vinna HM í fótbólti?**
– Mær dámdi væl fótbólt fyrr, men nú hati eg fótbólt. Tað einasta góða við fótbólti er, at ein kann hygga eftir vøkrum monnum sum spæla fótbólt í shorts! Eg kann hyggja eftir onkrum dysti, men tað hevur ikki mín áhuga. Hinvegin, vóni eg at Portugal gerst heimsmeistari

**■ Hvørjum vil tú heilsa?**
– Eg vil fegin heilsa vinum og kenningum. Eg bjóði teimum at verða vælkomin til Kollafjørð á stevnu. Eg vil eisini fegin senda eina serliga heilsan til Hildigarð í Australia og Albjørg, ið er farin til skips við Arctic Viking.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -- |
| Nuuk | 2 |
| Qaqortoq | 4 |
| Ammassalik | 4 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 9 |
| Seyðisfjørður | 8 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 11 |
| Aberdeen | 15 |
| London | 23 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 14 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 14 |
| Keypmannah. | 18 |
| Helsinki | 13 |
| Moskva | 13 |
| Berlin | 18 |
| Warzawa | 14 |
| Kiev | 17 |
| Bukarest | 18 |
| Paris | 21 |
| Madrid | 32 |
| Róm | -- |
| Malorca | 29 |
| Athen | 24 |
| Malta | 24 |
| Tunis | 27 |
| Beijing | 31 |
| New Dehli | 38 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 15 |
| New York | 16 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | 22 |
| Panama | 29 |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 21 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt hátrýst, 1029 hPa. yvir Norðsjónum fer spakuliga norðureftir. Eitt lágtrýst, 997 hPa. eystan fyri Ísland fer í landnyrðing og dýpist.




**Í dag:**
Millum hátrýstið yvir norðara Norðsjógvin og lágtrýstið vestan fyri Írland rekur lýggj luft av suðri móti Føroyum.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 7/6 kl. 06⁰⁰– 8/6. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 10,0°
Minsti hiti máldur í juni: -0,3° - Mesti hiti máldur í mai: 20,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,9 mm – mált frá 7/6 kl. $06^{00}$– 8/6 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í juni: 6,7 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

4. juni Fyrra kvarter/ Mánin longst frá jørðini
11. juni Fullmáni
16. juni Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2006

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 8. juni | 04.46 | 17.05 | 03.46 | 16.05 | 04.01 | 16.20 | 06.46 | 19.05 | 07.46 | 20.05 | 03.01 | 15.20 | 02.01 | 14.20 | 05.01 | 17.20 | 06.01 | 18.20 | 04.31 | 16.50 | 05.46 | 18.05 |
| 9. juni | 05.25 | 17.47 | 04.25 | 16.47 | 04.40 | 17.02 | 07.25 | 19.47 | 08.25 | 20.47 | 03.40 | 16.02 | 02.40 | 15.02 | 05.40 | 18.02 | 06.40 | 19.02 | 05.10 | 17.32 | 06.25 | 18.47 |
| 10. juni | 06.09 | 18.30 | 05.09 | 17.30 | 05.24 | 17.45 | 08.09 | 20.30 | 09.09 | 21.30 | 04.24 | 16.45 | 03.24 | 15.45 | 06.24 | 18.45 | 07.24 | 19.45 | 05.54 | 18.15 | 07.09 | 19.30 |
| 11. juni | 06.52 | 19.19 | 05.52 | 18.19 | 06.07 | 18.34 | 08.52 | 21.19 | 09.52 | 22.19 | 05.07 | 17.34 | 04.07 | 16.34 | 07.07 | 19.34 | 08.07 | 20.34 | 06.37 | 19.04 | 07.52 | 20.19 |





Veitst tú eina góða?

Ring til Sosialin tlf 341800







**Vika 22 – 4. juni**
1. Centrum:
**10 - 66 - 31 - 43 - 27 - 05 - 55 - 03 - 35 - 71 - 21**

1. Ramme:
**17 - 33 - 30 - 14 - 07 - 74 - 13 - 20 - 59 - 48 - 69 - 26 - 60 - 49 - 63 - 75 - 32 - 08 - 52 - 64 - 51 - 72 - 42 - 67 23 - 62 - 29 - 04**

Fuld plade:
**47 - 02 - 36**

Fri spil: **__XEN**

| | |
|---|---|
| Fuld plade: 1. pr. | **123.257,- kr.** |
| 1. Ramme: 2. pr. | **10.653,- kr.** |
| 1. Centrum: 3. pr. | **10.653,- kr.** |
| Ramme: 4. pr. | **1.092,- kr.** |
| Centrum: 5. pr. | **64,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

5 707265 100050 >